# Viðtøkur fyri Hermótið

## § 1 Navn

Navn felagsins er Hermótið. Bústaður felagsins er Klaksvík, men postbústaðurin er, har formaðurin býr, um ikki annað er tilskilað.

## § 2.1 Visjón

Hermótið skal virka til frama fyri figur-borðspælsmentanini í Føroyum.

## § 2.2 Mál

Endamál felagsins er at eiga útgerð og reka virksemi til figur-borðspøl. Felagði skal náa hetta mál við at bjóða áhugaðum:

1. Hølið til at reka virksemi í.
2. Borð og útgerð til at kunna spæla og kappast.
3. Fyriskipa kappingar til frama fyri áhugabólkum kring alt Føroyar.
4. Hava tiltøk til frama fyri limirnar.

## § 3 Limaskapur

**3.1** Limaskapur fæst við at venda sær til nevnd Hermótsnins.

**3.2** Umbøn um limaskap skal góðkennast av nevndini.

**3.3** Skrásettir limir varveita sín limaskap við at gjalda limagjald.

**3.4** Limagjald verður ásett á aðalfundið.

**3.5** Limaskapur gevur rætt til at brúka hølið og útgerð til tað endamál tað er ætlað til.

**3.6** Limur ið skapar mistrivna í felagnum vegna ósømuliga atferð ella vanrøkir hølið og útgerð felagsins kann bannlýsast úr felagnum. Bannlýsing av limi verður avgjørd á nevndarfundi. Ein slík avgerð kann bara takast um tveir triðingar av atkvøðunum eru fyri. Limagjald í tí førinum verður ikki endurgoldið. Nevnd felagsins kann á sama hátt strika eina bannlýsing.

## § 4 Stuðulslimir

**4.1** Øll áhugaði ið ikki eru limir kunnu gerast stuðulslimir. Hetta gerast tey við at gjalda eitt árligt stuðulsgjald.

**4.2** Stuðulslimaskapur er ætlaður teimum, ið ynskja at stuðla virkseminum hjá Hermótinum, uttan at njóta ágóðarnar av vanligum limaskapi.
**4.3** Upphæddin fyri stuðulsgjald skal vera minst 100 krónur um árið.
**4.4** Stuðulslimir eru limir í Hermótinum, tó uttan rættin, ið er lýstur í punkt 3.5 undir § 3 Limaskapur.

## § 5 Nevnd

**5.1** Nevnd felagsins hevur ábyrgd av felaginum og virksemi tess. Nevndin telur tríggjar nevndarlimir og tveir tiltakslimir. Nevndin skipar seg við formanni, skrivara og kassameistara, ið somuleiðis er næstformaður. Undirskrift formansins er bindandi fyri felagið, og øll nevndin heftir fyri fíggjarligu ognir felagsins. Tó er keyp, søla ella veðseting av ognum, umframt aðrar fyriskipanir, ið fara út um vanliga raksturin av felagnum, treytað av aðalfundarsamtykt, og skulu tá allir nevndarlimir felagsins skriva undir tey skjøl, ið viðvíkja málinum.
**5.2** Formaðurin er umboð felagsins. Hann kallar nevndina til fundir og hevur eftirlit við at viðtøkur felagsins verða hildnar. Formaðurin skrivar ársfrágreiðing. Velur formaðurin at fara frá, so skal skrivast út nýval.
**5.3** Kassameistari hevur ábyrgd av búskapi felagsins. Hann umsitir bankakonta felagsins og alt fíggjarligt virksemi, sum at skráseta nýggjar limir, savna inn limagjald, gjalda leiðu, innkeyp og tað at útvega pengar til verkætlanir og tilltøk. Kassameistarin virkar eisini sum næstformaður, ið hevur sum uppgávu at hjálpa formannið við nevndar arbeiði og at avloysa formannin við fráverðu.
**5.4** Skrivarin hevur sum uppgávu at skriva í gerðabók. Skrivast skullu hvørji evni verða viðgjørd og hvørjar avgerðir verða tiknar á nevndarfundum og aðalfundið. Skrivarin hevur eisini ábyrgd av at gerðabókin er tøk til allar limir og at kunnað limir um virksemið í felaginum.

## § 6 Aðalfundur

Aðalfundurin, sum er hægsti myndugleiki felagsins, verður hildin árliga í Juli mánaði.  Lýsast skal 14 dagar frammanundan. Mál at leggja fyri fundin skulu vera nevndini í hendi í minsta lagi 7 dagar fyri fundin. Allar avgerðir á aðalfundinum verða tiknar við vanligum meiriluta. Nevndin sendir dagsskrá til limir 5 dagar fyri aðalfund.

*Skrá fyri aðalfundin:*

1. Val av orðstýrara og skrivara
2. Framløga av ársfrágreiðing
3. Framløga og góðkenning av roknskapi
4. Áseting av limagjaldi

7. Val av nevndarlimum og tiltakslimum
8. Uppskot frá nevnd ella limum til aðalfundin, sum er innlatið í seinasta lagi eina viku fyri fund.
9. Ymiskt

§ 7 **Eykaaðalfundur**

Kallast kann inn til eykaaðalfund, um meirilutin av nevndini ella tveir triðingar av limum felagsins krevja tað. Kallað verður inn til eykaaðalfund á sama hátt sum til aðalfund, við innkallingarfreist í minsta lagi eina viku frammanundan.

§ 8 **Avtøka**

Um tveir triðingar av limum felagsins krevja tað, kann felagið á regluligum aðalfundi ella eykaaðalfundi verða tikið av. Limirnir skulu í innkallingini kunnast um, at uppskot er um at taka felagið av. Verður felagið tikið av, verður á sama fundi við vanligum meiriluta tikin avgerð um, hvat gerast skal við ognir felagsins.

§ 9 **Viðtøkubroyting**

Hesar viðtøkur kunnu bert verða broyttar á regluligum aðalfundi ella eykaaðalfundi, um tveir triðingar av møttu limunum atkvøða fyri.

*Samtykt á aðalfundi 03-01-2019 og endaliga staðfest á eykaaðalfundi 03-01-2019*

*Váttað av umboðum fyri felagið Hermótið, møtt á fundi 03-04-2025*

| | | |
|---|---|---|
| Formaður | Bartal Mikladal: | ______________________________ |
| Kassameistari | Andrias Hansen: | ______________________________ |
| Skrivari | Arni Mikkelsen: | ______________________________ |